# Sangir hjá Mariusi á Torginum



Áhugaverd sending á Torginum í annaðkvøld.

Í sendingini á Torginum í annaðkvøld fara Svenning av Lofti og Absalon Absalon at umrøða sangir eftir Marius Absalonsen og somuleiðis brot úr lívssøgu hansara.

Marius yrkti nakrar sangir, sum verða roknaðir sum perlur millum andaligan skaldskap. Hann var sjómaður stóran part av lívinum, sigldi undir seinna heimsbardaga og var á veg úr Danmark til Føroya sum skipari á føroyska damparanum »Sildberin«, tá teir sigldu gjøgnum Skagerak, meðan Danmark og Noreg vórðu hersett. Bæði týskarar og bretar søgdu seg hava hersett Føroyar, og 30 fjórðingar úr Nólsoynni sóust fýra herskip, hetta vóru týskarar, sum høvdu ætlað at leggja Føroyar undir seg. »Sildberin« kom gjøgnum Nólsoyarfjørð samstundis sum bretar, ið komu at hersetta Føroyar, og tá so eitt herskip kom ímóti teimum, vistu teir ikki, um tað var brekst ella týskt.

Hetta og mangt annað hoyra vit í sendingini.



*– Hvussu hevur landsstýrismaðurin hugsað sær, at alt hetta blívur betri við færri starvsfólkum? Hvør tekur nú ábyrgdina av trygdini á okkara arbeiðsplássum? Út frá hesum má spurnartekin setast við avgerðina hjá Føroya Løgtingi og ætlan landsstýrismansins um at niðurraðfesta arbeiðseftirlitið!*



## Gerhardisma!

Um talan er um eitt nýyrði í føroyska málinum skal vera ósagt, men Oddfríður Marni Rasmussen, formaður í Rithøvundafelag Føroya nýtir hetta orðið um jagstranina, sum Dimmalætting og Gerhard Lognberg seinastu tíðina hava ført móti listafólki, sum fáa almennar pengar fyri at skriva bøkur, uttan at nøkur treyt verður sett teimum.

# Skráseta krígsminni

**KRÍGSMINNI Mentanarnevndin hjá Tórshavnar kommunu hevur samtykt at fara undir at skráseta øll jarðfest krígsminni frá seinna heimsbardaga í kommununi. 100.000 krónur eru settar av til endamálið**

Eirikur Lindenskov

Mentamálanevndin hjá Tórshavnar býráð hevur samtykt at fara undir at skráseta øll jarðfest krígsminni frá seinna heimsbardaga í kommununi. Samtykt er at seta 100.000 krónur av til endamálið.

Hendan samtykt er gjørd eftir at Mentamálaráðið í 2009 gjørdi av at staðfesta, at krígsminni frá seinna heimsbardaga eru friðað jarðfest fornminni. Avgerðin var grundað á tilmæli frá Fornminnisnevndini.

Hon segði, at neyðugt var at skipa fyri verndartiltøkum fyri krígsminnini, tí tey kámaðust skjótt, og væntast kundi, at áðrenn 100 ár eru liðin, er heildarmyndin mist.

– Nógvar leivdir frá seinna heimsbardaga hava verið í Tórshavnar kommunu, sum var ein miðstøð hjá bretska hersetingarvaldinum, men tær eru nógv fækkaðar, sigur Jógvan Arge, formaður í mentamálanevndini í Havn.

– Tað hevur týdning fyri okkara søgu, at Tórshavnar kommuna hevur skil á hesum fornminnum, og til tess betri at lúka setningin um, at krígsminni frá seinna heimsbardaga verða vard, er samtykt, at Tórshavnar kommuna fyri sítt viðkomandi ger eina dygga skráseting av øllum slíkum jarðfestum fornminnum, sigur Jógvan Arge.

Skrásetingin verður framd eftir altjóða skrásetingarháttinum SAVE, sum fyrstu ferð varð nýttur, tá Tórshavnar býaratlas varð gjørt fyri fáum árum síðani.

Friðingin hjá Mentamálaráðnum merkir, at fornminni frá seinna heimsbardaga skulu í framtíðini hava frið. Byggiætlan, sum kann hava við sær avleiðingar fyri eitt slíkt fornminni, skal framman undan góðkennast av fornminnamyndugleikunum.

Orsøkin at kunngerðin kom, var, at fólk hildu, at gingið var í so nær leivdunum frá seinna heimsbardaga, og varð ikki friðing sett í verk, so vóru hesi søguligu krígsminni skjótt burtur.



# Long kø uttan fyri Telebúðina

**KØTILBOÐ Telebúðin í Havn hevði serlig upplatingartilboð leygarmorgunin**

Eirikur Lindenskov

Úti við 100 fólk stóðu og bíðaðu uttan fyri handilin hjá Føroya Tele í miðbýnum leygarmorgunin. Handilin læt upp í nýggjum hami, og í hesum sambandi vóru tilboð upp á nakrar vørður fyri serprísir.



*Eini 100 fólk stóðu í kø uttan fyri Telebúðina í miðbýnum í Havn leygarmorgunin*

Handilin læt upp klokkan 10, men tey fyrstu stóðu longu uttanfyri einar tveir tímar frammanundan – uttan iva hava tey latið seg freista av at kunna keypa eitt nú ein iPad fyri slakar 500 krónur, sum eigur at kosta umleið 5.000 krónur. Tað má vera at keypa fyri spottprís.

Góðu tilboðini vóru avmarkað í nøgd, og tí var eittans til ráða at tak, at stilla seg í køina í góðari tíð...